| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. desember 2016 | Blað nr.: 1 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. desember 2016 **Kl**. 20:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Annika Olsen
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Mikael Viderø
Randi Saxov
Jórun Skylv Ludvig
Jákup Simonsen
Sigurð Ó. Vang
Birita Wardum

**LUTTÓKU IKKI:**
Jákup Dam, ið var uttalanda

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1/16 | 16/04646-1 | Val av borgarstjóra | 4 |
| 2/16 | 16/04602-1 | Skipan av valbólkum | 5 |
| 3/16 | 16/04603-1 | Val av 1. og 2. varaborgarstjóra | 6 |
| 4/16 | 16/04604-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum til fíggjarnevndina | 7 |
| 5/16 | 16/04663-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina | 8 |
| 6/16 | 16/04608-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í teknisku nevnd | 10 |
| 7/16 | 16/04605-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í trivnaðarnevndina | 11 |
| 8/16 | 16/04611-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í vinnunevndina | 13 |
| 9/16 | 16/04613-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í mentamálanevndina | 14 |
| 10/16 | 16/04664-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í náttúru- og umhvørvisnevndina | 15 |
| 11/16 | 16/04619-1 | Val av limi í hest- og koltursnevndina | 16 |
| 12/16 | 16/04622-1 | Val av limi í hvítanesnevndina | 17 |
| 13/16 | 16/04629-1 | Val av limi í kollafjarðarnevndina | 18 |
| 14/16 | 16/04624-1 | Val av limi í kaldbaksnevndina | 19 |
| 15/16 | 16/04626-1 | Val av limi í kirkjubøar- og velbastaðarnevndina | 20 |
| 16/16 | 16/04631-1 | Val av limi í nólsoyarnevndina | 21 |
| 17/16 | 16/04621-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í økisnevndina | 22 |
| 18/16 | 16/04632-1 | Val av 5 limum í gøtunavnanevndina | 23 |
| 19/16 | 16/04640-1 | Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini | 24 |
| 20/16 | 16/04615-1 | Val av 3 limum og einum tiltakslimi í P/f Fjarhitafelagið | 27 |
| 21/16 | 16/04617-1 | Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-nevndina | 28 |
| 22/16 | 16/04639-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina | 29 |
| 23/16 | 16/04630-1 | Val av 2 limum í nevndina fyri Føroya Barnaheim fyri 4 ár | 30 |
| 24/16 | 16/04634-1 | Val av tilbúgvingarnevnd | 31 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25/16 | 16/04636-1 | Val av valnevnd til býráðsvalið 2020 | 32 |
| 26/16 | 16/04641-1 | Val av 7 limum og tiltakslimum í skattakærunevndina | 33 |
| 27/16 | 16/04642-1 | Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár | 34 |
| 28/16 | 16/04609-1 | Val av tveimum limum í nevndina fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs | 35 |
| 29/16 | 16/04610-1 | Val av einum limi og tiltakslimi í stýrið fyri Listasavn Føroya | 36 |
| 30/16 | 16/04612-1 | Val av 5 limum í musikkskúlanevndina | 37 |
| 31/16 | 16/04633-1 | Val av limi og varalimi í stýrið fyri Tekniska skúlan í Tórshavn fyri 4 ár | 38 |
| 32/16 | 16/04625-1 | Val av limi og varalimi í skúlanevndina á Føroya Handilsskúla | 39 |
| 33/16 | 16/04614-1 | Val av 2 limum í Minnisgrunn Sonnu av Skarði | 40 |
| 34/16 | 16/04606-1 | Val av limum í nevndina fyri Mentanarvirðisiønir M.A. Jacobsens | 41 |
| 35/16 | 16/04616-1 | Val av 3 limum í nevndina fyri grunnin Vestnordisk Hovedstadsfond Nuuk, Reykjavík ogTórshavn | 42 |
| 36/16 | 16/04618-1 | Val av 6 limum í samstarvsnevndina Aberdeen-Tórshavn | 43 |
| 37/16 | 16/04620-1 | Val av 3 limum í samstarvsnevndina Stavanger-Tórshavn | 44 |
| 38/16 | 16/04623-1 | Val av 5 limum í kollegiunevndina fyri 4 ár | 45 |
| 39/16 | 16/04637-1 | Val av einum limi í nevndina hjá Dr. Ingridar barnagarði fyri 4 ár | 46 |
| 40/16 | 16/04638-1 | Val av limi í nevndina fyri Sankta Josefs barnagarð | 47 |
| 41/16 | 16/04644-1 | Val av nevndarlimi í nevndina fyri felagið Tórshavn | 48 |

## *1/16 Val av borgarstjóra*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 1/16 | 16/04646-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 6 í kommunustýrislógini er ásett:

“Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja til borgarstjóra, varaborgarstjóra, nevndarlim ella umboð, umframt at gera aðrar kommunalar uppgávur, sum kommunustýrið áleggur honum.

*Stk. 2.* Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2.”

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at býráðið velur borgarstjóra

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Tvey uppskot vóru at gerast borgarstjóri: Annika Olsen og Heðin Mortensen

Atkvøðugreiðslan víst at:

Annika Olsen fekk 7 atkvøður

Atkvøðuna hjá Gunnvør Balle, Annika Olsen, Bergunn Kass, Bogi Andreasen, Turið Horn, Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal.

Heðin Mortensen fekk 6 atkvøður:

Atkvøðuna hjá Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Heðin Mortensen

Sostatt var Annika Olsen vald sum borgarstjóri.

# 2/16 Skipan av valbólkum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 2/16 | 16/04602-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 3 í kommunustýrislógini er ásett:

Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.

*Stk. 2.* Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.

*Stk. 3.* Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.

*Stk. 4.* Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.

*Stk. 5.* Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir stk.1-3

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðslimum til at boða frá valbólkum

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Framsókn boðaðu frá, at teir vóru gingnir saman í valbólk, har limirnir eru Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Turið Horn, Annika Olsen, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin boðaðu frá, at teir vóru gingnir saman í valbólk, har limirnir eru Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 3/16 Val av 1. og 2. varaborgarstjóra

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 3/16 | 16/04603-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 6 stk. 3 í kommunustýrislógini er ásett:

Varaborgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Varaborgarstjórin er í borgarstjórans stað, tá hesum berst frá, sí tó § 24, stk. 2. Ásetir kommunustýrisskipanin, at 1. og 2. varaborgarstjóri skulu verða valdir, fer valið fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

Sambært § 2 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** Samsvarandi reglunum í kommunustýrislógini velur býráðið við meirilutavali ein borgarstjóra fyri alt valskeið býráðsins. Borgarstjórastarvið er fulltíðarstarv. Eisini velur býráðið við lutfalsvali ein varaborgarstjóra og ein 2. varaborgarstjóra.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 1. og 2. varaborgarstjóra

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Gunnvør Balle var vald sum varaborgarstjóri og Heðin Mortensen sum 2. varaborgarstjóri.

## 4/16 Val av 5 limum og tiltakslimum til fíggjarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 4/16 | 16/04604-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 28 og § 38 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28 Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt

§ 28 stk 2 ásetir:

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 38 Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar. Borgarstjórin er nevndarformaður.

*Stk. 2.* Fíggjarnevndin samskipar og fylgir við fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 4 limir til fíggjarnevndina, borgarstjórin er føddur formaður í nevndini. Harumframt, at býráðið velur 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Annika Olsen | Jákup Dam |
| Gunnvør Balle | Marin Katrina Frýdal |
| Bergun Kass | Turið Horn |
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Helena Dam á Neystabø |

## 5/16 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 5/16 | 16/04663-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 25 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** Byggi og býarskipanarnevndin hevur 5 limir.
**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Býarskipan og byggisamtyktir, 2. Útstykkingar , 3. Byggimál , 4. Lendismál
5. Kirkjugarðar, 6. Bygningsrakstur og -viðlíkahald av øllum kommunalum bygningum og anleggum eftir ásettari mannagongd
7. Fríðkan (viðarlundir, spælipláss, gøtur)
8. Áir, veitir og jarðarognir, tað veri seg traðarognir, urtagarðs- og onnur jarðar-stykki.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Gunnvør Balle |
| Bogi Andreasen | Turið Horn |
| Jákup Dam | Bergunn Kass |
| Tróndur Sigurðsson | Annfinn Brekkstein |
| Helena Dam á Neystabø | Halla Samuelsen |

## 6/16 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í teknisku nevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 6/16 | 16/04608-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært kommunustýrisskipanini § 24 er ásett:

Nevndin ansar eftir, at tær viðtøkur og reglugerðir, sum galda fyri málsøki nevndarinnar, verða fylgdar.
**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Bussleiðin 2. Vatnveiting og vatngóðska 3. Kloakkir og yvirflatuvatn
4. Vegir og ferðslumál 5. Gøtuljós 6. Onnur teknisk viðurskifti, ið ikki hoyra undir aðra nevnd

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Jákup Dam | Gunnvør Balle |
| Marin Katrina Frýdal | Turið Horn |
| Bogi Andreasen | Bergunn Kass |
| Annfinn Brekkstein | Bjørghild Djurhuus |
| Tróndur Sigurðsson | Helena Dam á Neystabø |

## 7/16 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í trivnaðarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 7/16 | 16/04605-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

§ 27 í kommunustýrisskipanini ásetur:

**1. petti.** Trivnaðarnevndin hevur 5 limir.
Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið ella eina sosiala nevnd, í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.
**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Barnatannrøkt 2. Barnavernd 3. Familjupolitikkur 4. Heilsu og umsorganartænasta
5. Fólkaheilsa

**3. petti.** Nevndin fyrisitur teir stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til sosial- og heilsulig endamál og kommunalar íbúðir og skipar fyri at útvega innbúgv, amboð og tílíkt til hesar.

Lutfalsval.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 5 limir í Trivnaðarnevndina, umframt 5 tiltakslimir

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Turið Horn | Gunnvør Balle |
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Bergunn Kass | Jakup Dam |
| Bjørghild Djurhuus | Halla Samuelsen |
| Helena Dam á Neystabø | Heðin Mortensen |

# 8/16 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í vinnunevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 8/16 | 16/04611-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 29 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Tórshavnar havn 2. Smábátahavn 3. Vinnubygningar og vinnuøki 4. Oljuvinnu
5. Fiskivinnu 6. Ferðavinnu 7. Cruisevinnu 8. Handils- og tænastuvinnu
9. Vinnunýskapan 10. Vinnustrategi 11. Hýruvognsloyvi.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Gunnvør Balle | Turið Horn |
| Jákup Dam | Bergunn Kass |
| Helena Dam á Neystabø | Heðin Mortensen |
| Bjørghild Djurhuus | Halla Samuelsen |

# 9/16 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í mentamálanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 9/16 | 16/04613-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 28 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Dagstovnaøkið 2. Fólkaskúli 3. Forskúli 4. Frítíðarskúli 5. Ungdómsvirksemi
6. Námsfrøðiliga ráðgevingin 7. Kvøldskúli 8. Musikkskúli 9. Býarbókasavn
10. Býarsavn 11. Mentanarhøli 12. Stuðulsskipanir 13. Svimjihøll
14. Uttandura vallir, ítróttaranlegg og ítróttahallir
15. Onnur mál av mentunarligum týdningi í kommununi.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Gunnvør Balle | Bergunn Kass |
| Turið Horn | Jákup Dam |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Dam |
| Heðin Mortensen | Helena Dam á Neystabø |
| Halla Samuelsen | Bjørghild Djurhuus |

# 10/16 Val av 5 limum og tiltakslimum í náttúru- og umhvørvisnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 10/16 | 16/04664-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 26 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** Umhvørvisnevndin hevur 5 limir.
**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Brennistøðin, 2. Ruskinnsavnanin, 3. Jarnmóttøku kemikaliur, spilloljuslamsúgving, rottangatøming, tyrving o.a.
4. Náttúru og umhvørvi, 5. Frílendi, 6. Framtíðar orka, 7. Umhvørvismál
8. Umhvørvisátøk so sum umhvørvisvika v.m.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Turið Horn | Marin Katrina Frýdal |
| Gunnvør Balle | Jákup Dam |
| Bergunn Kass | Bogi Andreasen |
| Bjørghild Djurhuus | Annfinn Brekkstein |
| Halla Samuelsen | Tróndur Sigurðsson |

## 11/16 Val av limi í hest- og koltursnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 11/16 | 16/04619-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 37 í kommunustýrislógini er ásett:

Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sambært § 36 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Hesti og Koltri verður vald ein nevnd við 5 limum.
Tríggir valdir av og millum borgararnar í Hesti og Koltri eftir reglunum í kommunalu vallógini.
Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.
Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja ein lim millum limir tess

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Valdur varð Heðin Mortensen.

## 12/16 Val av limi í hvítanesnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 12/16 | 16/04622-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 37 í kommunustýrislógini er ásett:

Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sambært § 32 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum á Hvítanesi verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar á Hvítanesi eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja ein lim millum limir tess

.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald varð Bjørghild Djurhuus.

# 13/16 Val av limi í kollafjarðarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 13/16 | 16/04629-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 37 í kommunustýrislógini er ásett:

Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sambært § 33 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Kollafirði verður vald ein nevnd við 5 limum.
Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kollafirði eftir reglunum í kommunalu vallógini.
Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.
Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja ein lim millum limir tess

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald varð Halla Samuelsen.

# 14/16 Val av limi í kaldbaksnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 14/16 | 16/04624-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 37 í kommunustýrislógini er ásett:

Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sambært § 31 í kommunustýrisskipanin er ásett:

**1.petti.** At taka sær av áhugamálum í Kaldbak verður vald ein nevnd við 5 limum.
Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kaldbak eftir reglunum í kommunalu vallógini.
Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.
Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Lutfalsval.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja ein lim millum limir tess

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald varð Helena Dam á Neystabø.

# 15/16 Val av limi í kirkjubøar- og velbastaðarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 15/16 | 16/04626-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 37 í kommunustýrislógini er ásett:

Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sambært § 35 í kommunustýrisskipanin er ásett:
**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Kirkjubø og á Velbastað verður vald ein nevnd við 5 limum.
Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kirkjubø og á Velbastað eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja ein lim millum limir tess

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Valdur varð Annfinn Brekkstein.

# 16/16 Val av limi í nólsoyarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 16/16 | 16/04631-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 37 í kommunustýrislógini er ásett:

Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sambært § 34 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Nólsoy verður vald ein nevnd við 5 limum.
Tríggir valdir av og millum borgararnar í Nólsoy eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.
Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja ein lim millum limir tess.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Valdur varð Heðin Mortensen.

## 17/16 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í økisnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 17/16 | 16/04621-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 36 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 36. Kommunustýrið kann seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd.

Sambært §§ 9 og 30 í kommunustýrisskipanini er ásett:
§ 9
1. petti. Býráðið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir og staðbundnar nevndir, ið skulu taka sær av ávísum málum ella gera fyrireikandi ella ráðgevandi arbeiði fyri býráðið, fíggjarnevndina ella hinar føstu nevndirnar, sí 6. part.

§ 30
1. petti. Undir fíggjarnevndini verður sett ein økisnevnd við 5 kommunustýrislimum, ið skal viðgera og taka stig til at dagføra og menna bygdirnar í kommununi.
2. petti. Nevndin arbeiðir í høvuðsheitum yvirskipað og tvørgangandi.
3. petti. Nevndin orðar økismenningarpolitikk fyri kommununa og setir ítøkilig mál fyri tey einstøku økini.
4. petti. Nevndin leggur síni tilmæli fyri fíggjarnevndina at bera víðari í skipanini

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býránum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limur | Tiltakslimir |
|---|---|
| Jákup Dam, | Bogi Andreasen |
| Bergunn Kass | Gunnvør Balle |
| Turið Horn | Marin Katrina Frýdal |
| Annfinn Brekkstein | Heðin Mortensen |
| Halla Samuelsen | Bjørghild Djurhuus |

## 18/16 Val av 5 limum í gøtunavnanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 18/16 | 16/04632-1 |

**Málslýsing:**
Arbeiðssetningurin hjá gøtunavnanevndini er soljóðandi (J.nr. 2010-0496):

"Gøtunavnanevndin er ráðgevandi nevnd hjá Tórshavnar býráði. Arbeiðssetningur hennara er soljóðandi: Gøtunavnanevndin kemur við uppskotum og ger tilmæli til mentamálanevndina um gøtunøvn, nøvn á torgum og øðrum slíkum nøvnum í kommununi eftir áheitan frá umsitingini. Eisini kann nevndin verða biðin um ummæli ella tilmæli um nøvn á bygningum hjá kommununi. Mentamáladeildin útvegar skrivara."

Fimm nevndarlimir skulu veljast.

Av teimum fimm verandi nevndarlimunum eru hesir tríggir sinnaðir at halda fram. Marjun Arge Simonsen, Viggo Christiansen og Guðrun Haustein.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í Gøtunavnanevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu Birgar Johannesen, Jógvan Arge, Kristin Magnussen, Marjun A. Simonsen og Guðrun Haustein.

## 19/16 Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 19/16 | 16/04640-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 50 í løgtingslóg nr.125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr.64 frá 7.juni 2007, skal kommunustýrið velja umboð í skúlastýrini.

Tvey kommunustýrisumboð skulu veljast í hvørt stýri, men tá færri enn 20 næmingar eru í einum skúla, skal eitt kommunustýrisumboð veljast. Valskeiðið hjá kommunuumboðunum er valskeiðið hjá kommunustýrinum.

Í Tórshavnar kommunu eru 10 fólkaskúlar. Skúlarnir eru hesir: Skúlin á Argjahamri, Skúlin á Fløtum, Sankta Frans skúli, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Skúlin við Løgmannabreyt, Kollafjarðar skúli, Kaldbaks skúli, Velbastaðar skúli og Nólsoyar skúli.

Næmingatalið í Nólsoyar skúla er 14, sostatt skal bert eitt kommunustýrisumboð veljast í skúlastýrið fyri Nólsoyar skúla.

Umframt kommunalu fólkaskúlarnar eru tveir frískúlar, teir eru Fríksúlin í Havn og Lítliskúli. Sambært § 12 stk. 4 í løgtingslóg nr. 46 frá 26.03.2002 kann kommunustýrið eftir áheitan frá skúlastýrinum gera av, at ein av limum tess er við á skúlastýrisfundi uttan atkvøðurætt. Tórshavnar kommuna hevur í løtuni eitt fyrisitingarligt umboð í skúlastýrinum fyri Lítlaskúla.

Lutfalsval í mun til teir 10 fólkaskúlarnar – har tveir kommunustýrislimir skulu veljast.

Meirilutaval í mun til skúlan í Nólsoy, Lítlaskúla og Fríksúlan í Havn.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 umboð til hvørt skúlastýrið í 9 fólkaskúlunum í kommununi, umframt 2 tiltakslimir fyri hvørt skúlastýrið.

**Skúlin á Fløtum**
Fastir limir	Tiltakslimir

**Eysturskúlin**
Fastir limir	Tiltakslimir

**Sankta Frans skúli**
Fastir limir	Tiltakslimir

**Skúlin á Argjahamri**
Fastir limir	Tiltakslimir

**Hoyvíkar skúli**
Fastir limir	Tiltakslimir

**Skúlin við Løgmannabreyt**
Fastir limir Tiltakslimir

**Kollfjarðarskúli**
Fastir limir Tiltakslimir

**Kaldbaks skúli**
Fastir limir Tiltakslimir

**Velbastaðar skúli**
Fastir limir Tiltakslimir

Eisini mælir kommunustjórin býráðnum til at velja 1 umboð fyri ávikavist skúlan í Nólsoy, Lítlaskúla og Frískúlan í Havn, umframt ein tiltakslim fyri hvørt skúlastýrið.

**Nólsoyar skúli**
Fastur limur Tiltakslimur

**Lítli skúli**
Fastur limur Tiltakslimur

**F111rískúlin í Havn**
Fastur limur Tiltakslimur

**Býráðsfundur 30. desember 2016:**
Skúlin á Fløtum

| | |
|---|---|
| Gunnvør Balle | Bogi Andreasen |
| Helena Dam á Neystabø | Halla Samuelsen |

Eysturskúlin

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Turið Horn | Bergunn Kass |
| Halla Samuelsen | Bjørghild Djurhuus |

Sankta Frans skúli

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Dam |
| Annfinn Brekkstein | Bjørghild Djurhuus |

Skúlin á Argjahamri

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Bergunn Kass | Turið Horn |
| Bjørghild Djurhuus | Halla Samuelsen |

Hoyvíkar Skúli

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Bergunn Kass |
| Bjørghild Djurhuus | Annfinn Brekkstein |

Skúlin við Løgmannabreyt

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Turið Horn | Marin Katrina Frýdal |
| Tróndur Sigurðsson | Helena Dam á Neystabø |

Kollafjarðar Skúli

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Gunnvør Balle |
| Halla Samuelsen | Tróndur Sigurðsson |

Kaldbaks Skúli

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Jákup Dam | Bogi Andreasen |
| Halla Samuelsen | Bjørghild Djurhuus |

Velbastaðar skúli

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Jákup Dam | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Helena Dam |

Nólsoyar Skúli

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Turið Horn | Jákup Dam |

Lítli skúli

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Gunnvør Balle | Marin Katrina Frýdal |

Frískúlin í Havn

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bergunn Kass | Turið Horn |

# 20/16 Val av 3 limum og einum tiltakslimi í P/f Fjarhitafelagið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 20/16 | 16/04615-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 6 í viðtøkunum hjá P/F Fjarhitafelagnum er ásett:

"Í nevnd felagsins eru 6 limir
Nevndarlimir verða valdir fyri 4 ár í senn, men kunnu afturveljast
Valdir verða 2-3 tiltakslimir, sum taka sæti í nevndini, tí í ávísum nevndarlimi berst frá".

Ognarluturin hjá Tórshavnar kommunu í felagnum merkir, at 3 limir skulu veljast av býráðnum í nevndina, umframt ein tiltakslimur. Hinir 3 limirnir verða valdir av SEV.

Fyri at tryggja fakligu umboðan í nevndin, metir kommunustjórin, at tekniski stjóri eigur at verða valdur í nevndina saman við 2 øðrum limum. Víst verður á, at stjórin hjá SEV er umboðandi SEV í nevndini.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 3 limir, umframt 1 tiltakslim.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu Bogi Andreasen, Jákup Dam, Tróndur Sigurðsson og varalimur Turið Horn.

# 21/16 Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-nevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 21/16 | 16/04617-1 |

**Málslýsing:**
**4. grein**

NEVNDIN

Stk. 1. Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevnd sambært stk. 2.

Stk. 2. Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim.

Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi.

Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim og ein tiltakslim í Sev-nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald varð Marin Katrina Frýdal og sum varalimur Gunnvør Balle.

# 22/16 Val av 5 limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 22/16 | 16/04639-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013, § 4 skulu kommunurnar seta barnaverndarnevndir, ið verða valdar av kommunustýrinum. Í greinini er ásett, at í eini barnaverndarnevnd skulu vera í minsta lagi 3 limir og samsvarandi varalimir. Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu í minsta lagi hava eina viðkomandi miðallanga útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- og bygdarráð og hava eina revsivátttan.
Barnaverndarnevndin hevur síðan 2008 talt fimm nevndarlimir

Í 2012 vóru hesi vald: Ann Elisabeth Joensen, Poula Eidesgaard, Henrik Thomsen, Hjørdis Heindriksdóttir og Miriann Jacobsen. Tiltakslimir vóru: Eyðálvur Dimon, Bjarni Beder, Jóngerð Poulsen, Búi Brattaberg og Hildigunn Poulsen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:**

| Fastir limir | Varlimir |
|---|---|
| Súsanna Olsen | Róaldur Jákupsson |
| Maibritt Svabo Egholm | Búi Brattaberg |
| Jóannes Guttesen | Malan Eyðunsdóttir |
| Ann Elisabeth Joensen | Poula Eidesgaard |
| Henrik Thomsen | Eyðjálvur Dimon |

## 23/16 Val av 2 limum í nevndina fyri Føroya Barnaheim fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 23/16 | 16/04630-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin Føroya Barnaheim frá 5. apríl 1984 § 5 er leiðsla sjálvsognarstovnsins eitt stýri, sum hevur ta yvirskipaðu leiðsluna um hendi. Í § 6 er ásett, at í stýrinum eru 9 limir, har Tórshavnar býráð velur 2 limir. Valskeiðið er fýra ár og fylgir valskeiðnum hjá kommunalu ráðunum.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu Sigrun Wardum og Poula Eidesgaard.

# 24/16 Val av tilbúgvingarnevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 24/16 | 16/04634-1 |

**Málslýsing:**
**Sambært § 39 í kommunustýrisskipanini er ásett:**

**1. petti.** Tilbúgvingarnevndin hevur 5 limir.
Í Tilbúgvingarnevndini situr borgarstjórin, sum er formaður, brunaumsjónarmaðurin, eitt umboð fyri Føroya Landfúta og 2 aðrir limir, tilnevndir av kommunustýrinum.
**2. petti.** Nevndin fyrisitur kommunalu tilbúgvingina sambært løgtingslóg um tilbúgving og samsvari við galdandi reglugerðir og ársfíggjarætlan.

Siðvenja hevur verið, at 1. og 2. varaborgarstjóri, saman við borgarstjóranum, ið er føddur formaður, hava verið umboðað í nevndini.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Formansskapurin valdur í nevndina.

# 25/16 Val av valnevnd til býráðsvalið 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 25/16 | 16/04636-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 3, stk. 1, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, verður býráðsval fyriskipað og fyrireikað undir leiðslu av eini valnevnd, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Niels Nattestad, Bjørgfríð Ludvig, Jóan Petur Hentze og Eli Christiansen.

Øll uttan Niels Nattestad eru sinnað at halda fram í valnevndini.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 4 limir í valnevndina.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Niels Nattestad, Bjørgfríð Ludvig, Jóan Petur Hentze og Eli Christiansen.

Øll uttan Niels Nattestad eru sinnað at halda fram í valnevndini.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Nevndin afturvald og at velja Odd Færø fyri Niels Nattestad

# 26/16 Val av 7 limum og tiltakslimum í skattakærunevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 26/16 | 16/04641-1 |

## Málslýsing:
Sambært kunngerð nr. 8 frá 5. februar 2009 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar, skal Tórshavnar kommuna velja 7 limir og 7 tiltakslimir í kommunalu skattakærunevndina fyri Tórshavnar øki.

Fyrsti fundur hjá nývaldu nevndini verður fyrireikaður av einum av limunum. Tórshavnar kommuna ger sjálv av, hvør tað skal verða.

Í 2012 vóru hesi vald: Elin H. Joensen, Johan Samuelsen, Jógvan Martin Mørk, Margit Stórá, Jan Christiansen og Jákup Símun Simonsen. Tiltakslimir vóru: Katrin Gaard, Heri Ó. Dam, Anna Rubeksen, Bergur R. Dam Jensen, Jógvan Poulsen og Brandur í Dali.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 7 limir og 7 tiltakslimir í kommunalu skattakærunevndina fyri Tórshavnar øki.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Ruth Wang | Jákup av Skarði |
| Jan Christiansen | Joan Neshamar |
| Jákup Símun Simonsen | Berit W. Samuelsen |
| Brandur í Dali | Vígdis Joahnnesen |
| Elin H. Joensen | Katrin Gaard |
| Jóhan Samuelsen | Anna Rubeksen |
| Jógvan Martin Mørk | Bergur R. Dam. |

# 27/16 Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 27/16 | 16/04642-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.
Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

Í 2012 vóru hesi vald: Jan Poulsen, Torvald Lutzen, Just Rubeksen, Eddie Joensen, Jákup av Skarði, Anna Rubeksen og Snorri á Bøgarði. Tiltakslimir vóru: Karlon Winther, Heri Ó. Dam og Hans Silvan Johannesen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 3 limir í nevndina, umframt 3 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Hans Silvan Johannesen | Vivi Kirke Davidsen |
| Jákup av Skarði | Leivur Hansen |
| Edith Vang | Jóannes Guttesen |
| Torvald Lützen | Anna Rubeksen |
| Heri Ó Dam | Karlon Winther |

## 28/16 Val av tveimum limum í nevndina fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 28/16 | 16/04609-1 |

**Málslýsing:**
Sambært reglugerðini fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs eru fimm limir í nevndini. Barnabókavørðurin á Býarbókasavninum er fastur limur, skúlabókavørðirnir við kommunalu skúlarnar í kommununi velja ein lim og Tórshavnar býráð velur tveir limir. Harafturat er formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs fastur limur og er formaður í nevndini.

Sostatt skal býráðið velja tveir limir í nevndina.

Lutfalsval

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 2 limir í nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu Tráin P. Nónklett og Bjørg Dam.

# 29/16 Val av einum limi og tiltakslimi í stýrið fyri Listasavn Føroya

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 29/16 | 16/04610-1 |

**Málslýsing:**
Sambært reglugerð fyri Listasavn Føroya velur landsstýrismaðurin í mentamálum formannin í stýrinum. Tórshavnar kommuna, Listafelag Føroya og Felagið Føroysk Myndlistafólk velja hvør sín. Stýrið verður valt fyri eitt 4 ára skeið.

Siðvenja hevur verið, at formaðurin í mentamálanevndini hevur verið valdur.

Meirlutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja ein lim og ein tiltakslim.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastur limur | Varalimur |
|---|---|
| Gunnvør Balle | Edith Vang. |

# 30/16 Val av 5 limum í musikkskúlanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 30/16 | 16/04612-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. reglugerð frá 30. september 2009 um Tórshavnar Musikkskúla, velur býráðið fimm nevndarlimir í eina musikkskúlanevnd, ið hevur til endamáls at fremja áhugamál skúlans. Eisini arbeiðir nevndin fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.

Verandi nevnd hevur sett ynski fram um dagføringar av reglugerðini. Umsitingin kemur ætlandi við tilmæli í fyrsta ársfjórðingini 2017.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu Rói B. Poulsen, Uni Árting og Malan Eyðunsdóttir, Malan Thomsen og Jens Marni Hansen.

# 31/16 Val av limi og varalimi í stýrið fyri Tekniska skúlan í Tórshavn fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 31/16 | 16/04633-1 |

**Málslýsing:**
Stovnurin virkar sambært viðtøkum fyri Tekniska Skúlan í Tórshavn, dagfestar 20. oktober 2004. Sbrt. viðtøkunum § 2, stk. 2, litra b. velur kommunan, har skúlin hoyrir heima ein lim og ein varalim.
Í løgtingslóg nr. 79 frá 22. Mai 2015 um skúladepil í Marknagili verður tekniski skúli niðurlagdur. Henda tilgongd er í gongd og sannlíkt at tað hendir innan komandi árið.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 1 lim í nevndina, umframt ein tiltakslim.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastur limur | Varalimur |
|---|---|
| Annika Olsen | Gunnvør Balle |

# 32/16 Val av limi og varalimi í skúlanevndina á Føroya Handilsskúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 32/16 | 16/04625-1 |

**Málslýsing:**
Stovnurin virkar sambært viðtøkum fyri Føroya Handilsskúla, dagfestar 30. mars 2001. Sbrt. viðtøkunum § 2, stk. 2, litra b. velur kommunan, har skúlin hoyrir heima ein lim og ein varalim.
Í løgtingslóg nr. 79 frá 22. mai 2015 um skúladepil í Marknagili verður Handilsskúlin niðurlagdur. Henda tilgongd er í gongd og sannlíkt at tað hendir innan komandi árið.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 1 lim í nevndina, umframt ein tiltaks lim.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastur limur | Varalimur |
|---|---|
| Annika Olsen | Gunnvør Balle |

## 33/16 Val av 2 limum í Minnisgrunn Sonnu av Skarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 33/16 | 16/04614-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 9 í reglugerðini fyri grunnin verður hann stýrdur av eini trímannanevnd, sum býráðið tilnevnir. Nevndin skipar seg sjálv. Býráðsformaðurin er føddur limur í nevndini. Hinir tveir stýrislimirnir verða tilnevndir fyri 4 ár í senn, og kunnu verða tilnevndir í mesta lagi 3 ferðir íalt.

Miðað verður ímóti, at teir báðir stýrislimirnir, sum býráðið tilnevnir, hava áhuga fyri og skil á handarbeiði. Teir nýtast ikki at vera býráðslimir.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 2 limir í nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Valdar vórðu Beinta Poulsen og Emly Djurhuus.

## 34/16 Val av limum í nevndina fyri Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 34/16 | 16/04606-1 |

**Málslýsing:**
Sambært reglugerðini fyri Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens eru fimm limir í nevndini. Rithøvundafelag Føroya velur ein lim, Fróðskaparsetur Føroya velur ein lim og Tórshavnar býráð velur 3 limir.

Í 2012 vóru hesi vald: Maria H. Olsen, Erling Isholm og Jákup Jacobsen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 3 limir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Valdir vórðu Jákup Jacobsen, Erling Isholm og Høgni Joensen.

# 35/16 Val av 3 limum í nevndina fyri grunnin Vestnordisk Hovedstadsfond Nuuk, Reykjavík ogTórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 35/16 | 16/04616-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 4, stk. 1 og 2, í viðtøkunum fyri grunnin "Vestnordisk hovedstadsfond Nuuk, Reykjavík og Tórshavn" eru níggju limir í stýrinum fyri grunnin. Hvør kommuna hevur tríggjar limir, og hesir eru borgarstjórin og tveir kommunustýrislimir/býráðslimir. Valskeiðið fylgir valskeiðnum hjá viðkomandi kommunustýri.

Í Tórshavnar kommunu hevur siðvenjan verið, at borgarstjórin og teir báðir varaborgarstjórarnir hava verið í stýrinum.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 3 limir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Formansskapurin valdur.

# 36/16 Val av 6 limum í samstarvsnevndina Aberdeen-Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 36/16 | 16/04618-1 |

**Málslýsing:**
Í semju um samstarv millum Aberdeen City Council og Tórshavnar Býráð frá september 1999 stendur m.a.:

"Harumframt eru vit samdir um: (...) At seta á stovn eina felags Nevnd, sum skal taka sær av omanfyri nevndu ætlanum við 6 limum frá hvørjum undirskrivara. Av hesum skulu eisini umboð vera fyri vinnulívið. Nevndin skal møtast á hvørjum ári antin í Aberdeen ella Tórshavn."

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 6 limir í nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Formansskapurin valdur.

## 37/16 Val av 3 limum í samstarvsnevndina Stavanger-Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 37/16 | 16/04620-1 |

**Málslýsing:**
Sambært samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og Stavanger kommunu, undirskrivað 23.08.2000, skal ein samstarvsnevnd setast við í mesta lagi 6 umboðum úr hvørjum býi. Í samstarvsnevndini, sum hevur fund eina ferð um árið í ávikavist Stavanger og Tórshavn, eru umboð fyri býráðið, fyrisitingina og vinnulívið.

Siðvenja hevur verið, at formansskapurin hevur umboðað kommununa í nevndini.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja 3 limir í samstarvsnevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Formansskapurin valdur.

# 38/16 Val av 5 limum í kollegiunevndina fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 38/16 | 16/04623-1 |

**Málslýsing:**
Kollegiunevndin er nevndin fyri sjálvsognarstovninum Næmingarheimið undir Fjalli. Sbrt. viðtøkunum frá juli 1989 § 4 velur Tórshavnar býráð 5 limir í nevndina fyri sjálvsognarstovnin og veljast kunnu limir, sum tó ikki eru býráðslimir.

Eftir umbøn frá nevndini dagf. 8. mai 2015 til Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið er ætlanin at taka stovnin av soleiðis, at Bústaðir yvirtekur stovnin. Býráðið hevur 19. apríl 2016 givið síni góðkenning, og væntast endaliga avtøkan og yvirtøkan fram í komandi ári.

Í 2012 vóru hesi vald: Levi Mørk, Katrin Gaard, John av Reyni, Hanus Pál Jógvansson og Rói Poulsen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu Høgni Reistrup, Tráin P. Nónklett, Vigdis Johansen, Katrin Gaard og Heri Ó. Dam.

# 39/16 Val av einum limi í nevndina hjá Dr. Ingridar barnagarði fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 39/16 | 16/04637-1 |

**Málslýsing:**
Sambært reglugerð § 3 verður sjálvsognarstovnurin Drotning Ingridar Meinigheitsbarnagarður stjórnaður av eini nýggjumannanevnd. Tórshavnar kommuna velur ein lim fyri sítt valskeið. Nevndin fyri KFUK velur ein lim, nevndin fyri Meinigheitshúsið velur ein lim, Meinigheitsráðið verlur ein lim. Prestur er føddur limur í nevndini. Haraftrat velur nevndin ein lim, ið skal vera lækni. Hinir báðir nevndarlimirnir verða valdir av og millum foreldrini, sum hava børn á stovninum. Valini eru fyri valskeið býráðsins.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Valdur varð Emil Hermansen,

# 40/16 Val av limi í nevndina fyri Sankta Josefs barnagarð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 40/16 | 16/04638-1 |

**Málslýsing:**
Sambært viðtøkunum § 3 verður sjálvsognarstovnurin stjórnaður av eini fimmmannanevnd. Tórshavnar kommuna velur tríggjar limir, harav tveir eftir tilmæli frá fransiskanarsystrunum. Hinir báðir nevndarlimirnir verða valdir av og millum foreldrini, sum hava børn á stovninum. Valini eru fyri valskeið býráðsins.

Fransiskanarsystrarnar hava tilmælt: Louisa Smets, fransiskanarasystur og Kára Durhuus, lærara.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim í nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Valdur varð Leivur Hansen.

## 41/16 Val av nevndarlimi í nevndina fyri felagið Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 41/16 | 16/04644-1 |

**Málslýsing:**
**Í viðtøkunum fyri Felagið Tórshavn:**

**§ 6 Nevnd**

Nevndin telur 7 limir, sum sita fyri 2 ár í senn.

Nevndarvalið er frítt millum limir felagsins ella umboð teirra, tó skal sitandi nevnd leggja uppskot fyri aðalfundin um val av nevndarlimum, ið tryggja at fjølbroyttu og ymisku áhugamálini og møguligu skipaðir áhugabólkar verða so væl umboðað í nevndini, sum til ber.

Á fyrsta ársaðalfundi aftaná stovnan verða við lutakasti 3 nevndarlimir fyri vali. Afturval kann fara fram. Fyri hvønn einstakan nevndarlim verður tiltaksnevndarlimur valdur.

Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og kassameistara.

Nevndin er viðtøkufør, tá í minsta lagi 5 limir eru á fundi.

Felagið Tórshavn hevur sambært siðvenju valt eitt umboð frá býráðnum í nevndina. Tískil hevur býráðið sambært hesi siðvenju valt eitt umboð til hesa nevnd. Í 2012 varð Rókur Tummassarson valdur í nevndina.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim til nevndina hjá Felagnum Tórshavn

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald varð Súsanna Lausen.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. desember 2016 | Blað nr.: 49 |
| | Formansins merki: |

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annika Olsen | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle | Turið Horn |
| | Bergun Kass | |